# Alle sammen teller

Rithøvundur og myndprýðing: Kristin Roskifte (NO) Forlag: Magikon
Vann Barna- og ungdómsvirðisløn Norðurlandaráðsins í 2019




ISBN 978-952-7490-03-7

Søgugongd: *Øll somul telja við* er eitt heiti við tvítýddari merking. Tað vísir til, hvussu virðismikið hvørt einstakt menniskja er, samstundis sum øll kunnu vera við til at telja menniskju í myndunum, frá einum til túsund. Tey hittast á bókasavninum, á strondini, á spæliplássinum og aðrastaðni, tó uttan neyðturviliga at kennast. Øll eru ymisk við hvør síni heilt egnu søgu.
Fyrst hitta vit Tummas og familju hansara. Eitt barn, sum grundar um, hvussu mong munnu hyggja at stjørnuloftinum í senn. At enda koma túsund menniskju saman at hyggja at einari halastjørnu, og spurningurin hjá Tummasi verður svaraður.

Evni: umfevning, margfeldi, tolsemi, einstaklingur og bólkur, samanhald, demokrati

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørjar forvitnisligar smálutir finna tit? Teljið saman.**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at kápumyndini. Hvat heldur tú, bókin snýr seg um? Hvør hevði tú viljað verið?**

**2. Hygg at fyrstu myndini við dreinginum. Hvørjum hyggur hann at? Hvønn hugsar hann um?**

**3. Hvussu nógv dugir tú at telja uppí? Ber til at telja alt? Far til uppslagið við 1000; finna tit dreingin og familju hansara?**

**2. Hygg at mynd fimm av familjuni hjá dreinginum. Hvussu mong eru tey? Hvat heldur tú, teimum dámar at gera? Hvønn hevði tú viljað spælt við?**

**4. Tekna ein persón, tú kundi hugsað tær at komið at kent. Klipp figurarnar út og líma teir á eina plakat, sum eina felagsmynd.**

### MIÐLINGAR

**1. Um tøl og at telja á fleiri málum: Hvussu mong mál eru í flokkinum ella á stovuni? Vel eitt myndauppslag og finn smálutir at telja, kanska á fleiri málum. Kanska onkur hevur hug at læra onnur at telja á sínum móðurmáli?**

**2. .Hygg at myndini av 100 persónum, sum spæla í einum skúlagarði. Hvat spæla børnini? Hvønn á myndini kundi tú hugsað tær at kent? Hvørji spæla saman, og hvør spælir einsamallur? Dámar tær best at spæla einsamallur ella saman við onkrum? Hvussu bjóðar ein øðrum at koma við í eitt spæl?**

**3. Á tí síðsta uppslagnum hyggja mong menniskju í senn at einari halastjørnu. Hvat er ein halastjørna? Er jarðarknøtturin ein stjørna? Heldur tú, at nakar býr á øðrum stjørnum?**

**4. Teknispæl: Øll tekna eitt menniskja i fullari støðd, sum verður klipt út og límað saman sum ein bólkamynd. Kunnu tit finna upp á eina søgu um, hvat tey gera saman?**

## TEY STØRRU BØRNINI

1. Hvat dámdi tær best við bókini? Var okkurt, sum tú saknaði í bókini ella ikki skilti? Veitst tú um søgur ella bøkur, sum líkjast ella snúgva seg um okkurt av tí sama?

2. Hygg at myndini á síðu seks. Har standa nøkur fólk í einari lyftu, tey kennast ikki.
Hvat kunnu tey gera, um tey hava hug at koma at kennast?

3. Hygg at myndini á síðu seks. Ein maður og ein kona, sum ikki kennast, kenna seg bæði einsamøll. Hygg og legg til merkis, hvussu tey koma at kennast á mongu síðunum í bókini: Uppslag 18: tey møtast á bókasavninum. Uppslag 27: tey hyggja at einari framsýning. Uppslag 30: tey spáka í lundini. Uppslag 50: tey sita saman á einari kaffistovu. Uppslag 60: tey giftast. Uppslag 135: tey fara at ferðast. Uppslag 1000: tey síggja eina halastjørnu

4. Hygg at myndini á uppslagi 400. Práta um tað, sum hendir. Hvat er ein kravgonga? Hvør kann ganga kravgongu? Hvat hevði tú gingið kravgongu fyri?

5. Lutaleikur, teknileikur ella skrivileikur: Finn upp á eina søgu við fleiri brotum um onkur av fólkunum í bókini, hvørji tey eru, hvørjum tey eru bundin av, og hvussu tey møta onkrum av hinum í bókini.



**LES EISINI:**

*Jag och alla* eftir Ylvu Karlsson og Saru Lundberg

MÁLBITIN

## Dugir tú at telja upp í trý á øllum norðurlandamálum?

| svenskt | danskt | norðursamiskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ett, två, tre | En, to, tre | Okta, guokte, golbma | Einn, tveir, þrír | Eitt, tvey, trý | Ataaseq, marluk, pingasut | Yksi, kaksi, kolme | En, to, tre |

Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!